DIGITALT LJÓÐSTUDIO!

BÍLIGARI ENN Í DANMARK!

20995,00

Spar 14905,-

YAMAHA
DIGITALT LJÓÐSTUDIO
AW4416 • 16 mono-, 1 stereo- umframt 128 virtuell upptökuspor - ialt 130 spor • Tíðarkompression/expansion umframt pitch change • Digitalur ljóðblandari við 44 input ialt 16 frá HD, 16 via I/F-kort, 8 A/D input umframt 2 stereo, f.x. retur • 8 subgruppur, 8 aux-blokkar • 24-bit A/D, 24-bit D/A • Fall- og "real-time" automatisering av øllum digitalum parametrum á ljóðblandaranum • 4-bands parametrisk EQ á øllum kanalum • Dynamisk (komp/lim/gate) effektir á øllum kanalum • Tvey integreraða effektsystem við reverb/delay/modulation/kombinationseffektum • 8-tóna loop/phrase samplari umframt 16-spors sequencer • 90 sek. RAM (sampling rate 44,1/16-bit) • SCSI-portur til data backup • 320x240 punkt LCD umframt FLdisplay • 60 mm motorstýrdir fadarar • Portur til PC-kompatibla mús • CD/RW kann installerast • Word Clock I/O • Midi in, Midi out/thru • MTC out • Stødd: 550x460x148mm (BxDxH) • Vekt: uml. 10kg • Vanl. prísur: 35900,-

ELDING
SMS - Tel 319697 • Saltangará - Tel 449697 • Klaksvík - Tel 479697

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Skrivstovunæmingur

Tórshavnar kommuna søkir eftir skrivstovunæmingi.

Vit bjóða
tær eina fjølbroytta og áhugaverda skrivstovuútbúgving innan almenna fyrisiting. Praktiski parturin av útbúgvingini verður í høvuðsumsitingini hjá kommununi, har tú fert at luttaka í fjølbroyttum uppgávum m.a. á starvsfólkadeildini, roknskapardeildini og snarskivuni, meðan skúlagongdin verður í Danmark.

Tórshavnar kommuna hevur umleið 900 fólk í starvi og taka hesi sær av alskyns uppgávum í býnum. Sum næmingur í landsins størstu kommunu fært tú eitt sera gott innlit í kommunal viðurskifti og lærir at brúka allar hentleikar, ið hoyra til eina nútímans skrivstovu, t.d. internet, e-mail, elektroniska journal, lønar- og roknskapar-skipanir, elektroniskar peningaflytanir umframt vanlig skrivstovuforrit.

Í lærutíðini hevur tú møguleika fyri at taka teldukoyrikort.

Førleikakrøv
Umsøkjarar við HH-prógvi ella studentsprógvi hava fyrimun.

Meiri fæst at vita
um starvið við at venda sær til Janus Isfeldt, lønarfulltrúa: janus@torshavn.fo, ella Oskar Neshamar: oskar@torshavn.fo,ella á tlf. 31 51 60.

Umsókn
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Tórshavnar kommunu, Postbox 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 11. mars 2002. Viðmerk á umsóknina "skrivstovunæmingur".

SNARSKIVAN

Landssjúkrahúsið
Fo 100 Tórshavn

Bioanalytikara

summarferiuavloysarar

Tvey avloysarastørv sum bioanalytikarar á Rannsóknarstovuni eru leys til setan frá 1. mai 2002 til og við 30. september 2002. Um áhugi er fyri tí, er møguleiki fyri stytri tíðarskeiði innan sama tíðarkarm.

Rannsóknarstovan umfatar m.a.:
- kliniska biokemi
- kliniska immunulogi
- kliniska mikrobiologi
- kliniska fysiologi
- patologi

Tað verða eina ferð um vikuna tiknar blóðroyndir úti á bygd.

Førleikakrøv:
- bioanalytikaraútbúgving
- góð samstarvsevni
- fleksibilitetur

Nærri fæst at vita um størvini við at ringja tlf. 313540, Ivy Hansen, leiðandi bioanalytikara, lokal 121. e-post: ivyh@ahs.fo.

Setanartreytir:
Løn og setanartreytir smb. sáttmála Fíggjarmálastýrið og Bioanalytikarafelagið.

Umsóknarfreistin er: 2. apríl 2002 – kl. 12⁰⁰.

Skrivligar umsóknir við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skulu sendast til:

Landssjúkrahúsið
Starvsfólkadeildin
100 Tórshavn

KT fólk til ORACLE á Hagstovuni

Vit sóknast eftir einum væl útbúnum starvsfólki til KT deildina.

Arbeiðið á Hagstovuni er skipað á tann hátt, at flestu hagtalsuppgávur verða loystar í samstarvi millum hagfrøðingar og KT starvsfólk, og tað er til slíkar verkætlanir, at vit sóknast eftir einum fólki.

KT skipanirnar á Hagstovuni eru grundaðar í einum ORACLE umhvørvi við bæði UNIX og WINDOWS teldum. Í arbeiðinum á KT deildini verða brúkt ORACLE menningarmoðini SQL, PL/SQL, DEVELOPER og DESIGNER.

Kunnleiki til eitt ella helst fleiri av hesum amboðum er ein fortreyt.

Trý fólk eru í KT-deildini, og eru tey uppi í øllum verkætlanum á stovninum. KT arbeiðið á stovninum er eyðkent av, at nýggjar skipanir alsamt verða mentar, samstundis sum verandi skipanir verða viðari mentar. Sostatt er arbeiðið ógvuliga fjølbroytt og møguleiki er at royna seg á nógvum KT økjum.

Starvið verður lønt í samsvari við førleikar og starvsinnihald, sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálastýrið.

Umsóknarfreistin er 15.mars 2002.

Til at fáa meira at vita um starvið, set teg í samband við Berg Dam ella Hermann Oskarsson á Hagstovu Føroya, telefon 35 28 00.

AJOUR ✓

BÓKHALD og ROKSKAPUR

- fært tú stress av dungunum?
- ov lítla tíð til kundar og familju?

so set teg í samband við Ajour, vit kunnu taka okkum av tygara:

- bókføran og avstemman
- mvg uppgerðum
- lønum og avrokningum
- roknskapi
- rakstrar- og fíggjarætlanum
- vit kunnu heinta skjølini skild ella óskild

Kundarnir hjá Ajour eru:

- handverksmeistarar
- handlandi
- minni framleiðsluvirkir
- tænastuvirkir
- smærri kommunur

Páll Larsen Tel: 444320
Norður í gerði 11 Far: 218320
530 Fuglafjørður larsen@post.olivant.fo

PS: Ein ikki AJOURførd roknskaparskipan gevur onga fráboðan um gongdina

CAMBRIDGE EXAMINATIONS

First Certificate in English (FCE)
Certificate in Advanced English (CAE)
og
Certificate of Proficiency in English (CPE)

Tilmeldingarfreistin til prøvtøkurnar í mai/juni 2002, er úti **8. mars 2002 kl. 12⁰⁰**.

Tilmeldingargjald:

First Certificate in English	kr. 700,–
Certificate in Acvanced English	kr. 800,–
Certificat of Proficiency	kr. 900.–

Tilmelding fer fram á Setursskrivstovuni

kl. 9⁰⁰ – 16⁰⁰ vanligar dagar og
til kl. 12⁰⁰ fríggjadagin 8. mars 2002.

Seturskrivstovan
J. C. Svabos gøta 4,
FO-100 Tórshavn.
Tlf. 315302.

SUPER DEKK

Søkir eftir røskum og dugnaligum bilsmiði ella persóni við líknandi førleika at byrja skjótast gjørligt.

Løn: Sambært avtalu.

Um tú ynskir at vita meir um starvið, kanst tú venda tær til Super Dekk Sp/f tlf. 314975 ella 214975, og tosa við Fríðrik Bláhamar.

Sp/f SUPER DEKK
Hoyvíksvegur 66 · Postboks 3012 · FO–110 Tórshavn
Tlf.: (+298) 314975 · Fax: (+298) 318172 Fartlf.: (+298) 214975
e-mail: superdek@post.olivant.fo

Vit hava nú aftur fingið nakrar flugufangarar á goymslu

Flugufangarnir eru sera effektivur og verða brúktir bæði privat og á virkjum, fjósum o.a.

ALTI 2100 til rúm støddir uml. 50-80 m²	prísur einans	kr. 1.895,-
ALTI 2138 til miðal stór rúm uml. 100-150 m²	prísur einans	kr. 2.095,-
ALTI 2214 til rúm støddir uml. 200 m²	prísur einans	kr. 2.995,-

SPF. ALTING tlf. 210 298 fax 318 591
Vit senda um alt landið

Leguvognar til sølu

VOGEL ZANG, 3 akslaður leguvognur árg. 1980 við alu-lúkum og krana.

SNEDKERGÅRDEN, 3 akslaður leguvognur árg. 1983.

NOPA, 2 akslaður leguvognur árg. 1987 við bingjulásum til 2 x 20 fót ella 1 x 40 fót.

P/F Heri Thomsen
FO–510 Gøta
tlf. 441900 ella 211047

Far til sølu

M/B Mai verður við hesum lýst til sølu vegna Sp/f Mai í konkurs. Farið hevur kenningarbókstavir XPVP og er havnafrámerkt TG787.

Skipið er bygt úr bók og eik og hevur 6 cylindara 4 takt dieselmotor frá Grenaa Diesel, Danmark.

Eingi fiski- og/ella viðiloyvi eru knýtt at farinum.

Áhugað verða biðin um at venda sær til:

Advokatfelagið við Strond 4
Yviri við Strond 4 • 100 Tórshavn
tlf. 311260 • fax 311261

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi partafelag:

Skrásetingar-nr. P/F 3321
Navn: P/F Flakavirkið í Hvalba
Adressa: 850 Hvalba
Kommuna: Hvalbiar Kommuna
Stovningardato: 29.01.2002
Viðtøkudato: 29.01.2002
Kapitalur: Kr. 3.500.000,00
Innganjaldingarháttur: Kontant kr. 3.500.000,00 til kurs 100.
Stovnarar: P/F Maru Seafood, 700 Klaksvík (P/F 2727) og Íløgufelagið í Hvalba, 850 Hvalba (P/F 3322).
Nevnd: Jacob Pauli D. Hammer, 850 Hvalba (formaður), Sveinur Sigmundarson Poulsen, 850 Hvalba og Jóhan Páll Joensen, Rygsvegur 5, 700 Klaksvík.
Stjórn: Jóhan Páll Joensen, Rygsvegur 5, 700 Klaksvík.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóra, nevndarformanni ella tveimum nevndarlimum.
Grannskoðari: P/F KPMG, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 29.01.2002 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at eiga og reka ognir og annað virksemi í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 22. februar 2002

Kristin Balle

HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 35 64 00
Fax. + 298 35 64 01
E-mail: feagency@hfs.fo
www.hfs.fo

FOOD AND ENVIRONMENTAL AGENCY

2 størv sum eftirlitsfólk á fiskasjúkudeildini á Heilsufrøðiligu starvsstovuni eru leys at søkja, til setan 1. apríl 2002 ella skjótast gjørligt.

Bæði størvini fevna um:
- Eftirlit sambært galdandi lóggávu innan djórasjúkuøkið, við serligum atliti til alivinnuna sum heild
- Eftirlitið kemur serliga at fevna um sláturvirkir, brunnbátar, flutning av alifiski og annað virksemi innan alivinnuna, ið ber við sær vanda fyri spjaðing av fiskasjúkum
- Málsviðgerð í hesum sambandi
- Sýnistøku í.s.v. eftirlitið
- Annað

Faklig krøv
- Útbúgving sum laborantur, laboratoriuteknikari, fiskivinnutøkningur ella onnur hóskandi útbúgving, og/ella
- Hollar starvsroyndir innan alivinnuna við hóskandi eftirútbúgving.
- Koyrikort til bil er eitt krav.

Fyrimunir
- Royndir innan alivinnuna, eftirlitsarbeiði, innaneftirlitsskipanir, sýnistøku o.t.
- Somuleiðis hollar royndir í nýtslu av nýggjastu KT tøknini innan alivinnuna.
- Tekniskt innlit í útbúnað innan alivinnuna.
- Vit vænta góð samstarvsevni, nærlagni, evni at tosa við fólk umframt at duga at arbeiða sjálvstøðugt og miðvíst.

Vit kunnu bjóða:
- Fjølbroytt arbeiði, har uppgávurnar eru sera ymiskar, og tú kemur nógv runt í landinum.
- Møguleikar fyri at menna teg í arbeiðnum (skeið, eftirútbúgvingarmøguleikar o.t.).

Annað:
- Væntast skal, at áleið 50% av arbeiðstíðini fer við eftirlitsvitjanum á virkjum innan alivinnuna sum heild.
- Í.s.v. eftirlitsuppgávur skal roknast við, at arbeiðsdagarnir til tíðir kunnu verða sera langir.
- Tú skal tola broytingar í starvsinnihaldinum, so hvørt sum Fiskasjúkudeildin mennist.

Løn v.m.
Størvini verða sett sambært sáttmálanum millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálastýri, sí www.lnd.fo.

Umsóknir til bæði størvini við avritum av prógvum, eftirútbúgving, starvsroyndum og møguligum viðmælum skulu verða Starvsstovuni í hendi í seinasta lagi mánadagin 11. mars 2002.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Peter S. Østergaard fiskasjúkudjóralækna, ella Bárð Enni, stjóra.

Frá Eysturoyar Tjóðveldisfelag

Ársaðalfundur verður mikukvøldið 6. mars kl. 19.30 í Gøtu skúla.